# Bordeaux kann gerast meistari

Lyon hevur verið sterkasta felagið í Fraklandi seinastu árini, men nú eitt umfar er eftir at spæla av fronsku kappingini, er tað Bordeaux, sum stendur til at vinna meistaraheitið. Bordeaux skal bert hava eitt stig í seinasta dystinum næsta vikuskifti, so er felagið meistari. Einasta felag, sum kann hótta Bordeaux, er Olympique Marseille.



# Bayern vil hava Gomez

Mario Gomez hevur skorað mál á samlibandi fyri Stuttgart seinastu tvey kappingarárini, og nú vil týska stórfelagið, Bayern München, hava fatur í málskjúttanum. – Vit royna at styrkja liðið stig fyri stig, og Gomez er ein sera áhugaverdur spælari fyri okkum, sigur Uli Hoeness, manager í Bayern. Frammundan hevur Bayern álopsspælarar sum Luca Toni og Miroslav Klose í hópinum.

1. deild menn:

# FC Hoyvík tað besta næstbesta

**FC Hoyvík var tað einasta av teimum fýra fremstu liðunum, sum vann leygardagin, og tað gav oddasessin í 1. deild hjá monnum, nú fyrsti triðingurin av kappingini er spældur**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Heili 20 mál vóru í teimum fimm dystunum í níggjunda umfari í 1. deild, sum allir vóru spældir leygardagin. Fýra mál í miðal er nú ikki so galið, men í fleiri av dystunum spældi vindurin ein størri leiklut, so tí var tað nokk so sum so við dystardygdini.

Uppflytararnir úr Hoyvík eru á odda, nú fyrsti triðingurin er farin av kappingarárinum, meðan TB og B71 eru einastu beinleiðis uppflytingarkandidatarnir, sum her og nú kunnu fáa FC Hoyvík aftur. VB/Sumba er fimm stig aftanfyri, Skála 11 og MB heili 17 stig aftanfyri FC Hoyvík.

Enn er tó nógv eftir av kappingini í næstbestu deildini, so alt møguligt kann henda, áðrenn tað í heyst er greitt, hvørji tvey lið flyta upp og hvørji tvey flyta niður.



*Tey bæði fremstu liðini í 1. deild hjá monnum, nú ein triðingur er farin av kappingini, eru høvuðsstaðarfeløgini, FC Hoyvík og HB*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### VB/Sumba-B68 3-3

Í Vági tók VB/Sumba ímóti næstbesta liðnum í bestu toftamonnum í bestu líkindum, í mun til flestu av hinum dystunum. Her kom B68 best frá byrjan, tá Jonleif Højgaard skoraði til 1-0, men VB/Sumba kom afturíaftur, tá fyrst Jón Krosslá Poulsen javnaði og síðani Kenneth Kjærbo skoraði til 2-1. Men fyri hálvleik kom B68 aftur upp á javnt, tá Jonleif Højgaard enn eina ferð var upp á spæl.

Hálvleiksstøðan var altso 2-2, men í seinna hálvleiki syrgdi Oddur Højgaard fyri, at B68 kom á odda 3-2, og tað sá eisini út til at gerast úrslitið – ikki minst eftir at Jón Krosslá Poulsen var útvístur fyri kjaftaslit. Men í yvirtíðini megnaði VB/Sumba at javna, tá Henning Joensen í 92. minutti skoraði til 3-3.

Dramatikkurin í dystinum, sum annars stundum var væl spældur og hevði rímiliga ferð, var kortini ikki heilt av, tí áðrenn dómarin blásti av, var enn ein VB/Sumba-spælari, Sonni Kjærbæk, vístur út, tá hann feldi ein frían spælara hjá B68.

### Víkingur-HB 2-2

Var veðrið til vildar á Vágseiði, var synd at siga, at tað sama gjørdi seg galdandi á vøllinum uppi á Brekkum í Leirvík, har Víkingur tók ímóti HB. Talan var bæði um vind og ælaveður, men kortini var dysturin settur í gongd og enntá fullførdur.

Tróndur Sigurðsson legði mestsum beinanvegin HB á odda, men Martin Olsen, sum seinni mátti skaddur av vølli, javnaði fyri Víking miðskeiðis í fyrra hálvleiki.

Venjararnir tosaðu sínamillum um, at nú dysturin átti at verið avblástur í hálv-

# Einki av liðunum er nóg gott

**– Einki av liðunum í 1. deild er nóg gott til at standa seg í Vodafonedeildini. Í øllum førum ikki, sum tey higartil hava spælt, sigur Helgi L. Petersen, ið sjálvur er spælandi venjari hjá oddaliðnum í næstbestu mansdeildini, FC Hoyvík**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Í mong ár hevur 31 ára gamli Helgi L. Petersen spælt í bestu føroysku mansdeildini í fótbólti, umframt at hann eitt skifti var inni í hitanum á A-landsliðnum. Hann hevur spælt við barndómsfelagnum, NSÍ, og eitt skifti við GÍ, og so hevur hann eisini verið á besta liðnum hjá bæði B36 og ÍF.

Nú er hann venjari hjá tí liðnum, sum í løtuni liggur best fyri at flyta úr 1. deild og upp í Vodafonedeildina, FC Hoyvík, men eftir dystin í Miðvági leygardagin, sum gav oddasessin, helt hann speiskliga soleiðis fyri, at »vit eru í vanda fyri at flyta upp«. Og vit bóðu hann síðani útdjúpa eitt sindur, hvat liggur í tí:

– Nú hava vit spælt ímóti øllum liðunum í 1. deild, og út frá tí, sum eg havi sæð, hevði einki av øllum hesum liðunum – okkara egna íroknað – verið ført fyri at staðið seg í Vodafonedeildini. Skal nakað av teimum hava ein kjans, mugu tey gera sera nógv við tað, sigur Helgi L. Petersen.

– Í deildini eru fleiri av næstbestu liðunum hjá Vodafonefeløgunum, og tey kunnu sjálvandi ikki flyta upp. Men tey seks liðini, ið kunnu roknast sum potentiellir uppflytarar, eru ikki nóg góð til at flyta upp og standa seg har.

### Nógv restar í

Umframt FC Hoyvík, sum nú er oddalið, er TB nummar trý, B71 nummar fimm, VB/Sumba nummar seks, Skála nummar átta og MB nummar 10. Millum hesi eru so ávíkavist HB, B68, NSÍ og Víkingur. Soleiðis er støðan, nú fyrsti triðingurin av kappingini í 1. deild er farin aftur um bak.

Helgi heldur, at skal nakar uppflytari finnast í heyst, sum hevur ein veruligan møguleika at standa seg í bestu deildini í næsta ár, skal sera nógv henda við teimum liðum, sum vilja liggja framvið.

– Tey mugu gera sera nógv við tað, skulu tey gerast nóg góð. Í flestu førum vil tað snúgva seg um at keypa ið hvussu er ein ella tveir góðar spælarar, umframt nógv annað, sum bæði skal rættast og betrast, heldur hann.

– Sjálvandi er enn so stutt útliðið, at nógv kann henda, og tað er helst heldur ikki óvanligt, at venjingin í feløgunum í 1. deild kemur eitt sindur seinni í gongd, enn hon ger tað í Vodafonedeildini. Onkur av liðunum kunnu sjálvandi batna nógv, men í løtuni er einki av teimum nóg gott, og sum nú er, restar nógv í.



*Helgi L. Petersen, sum sjálvur er spælandi venjari hjá oddaliðnum í 1. deild, FC Hoyvík, heldur ikki, at nakað av liðunum í deildini er nóg gott til, at tað kundi staðið seg í Vodafonedeildini*
*Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen/ Einslistir*